**Hetta er ikki bert ein lýsing.**
**Hetta er ein upplýsing.**



## Tú veitst ivaleyst, at vit framleiða dygdarsápur, men tú eigur eisini at vita, at:



- allar húsarhaldssápur okkara verða mentar og **framleiddar í Føroyum** við serligum **atliti til umhvørvið**.
- allar húsarhaldssápur okkara verða mentar og framleiddar **samsvarandi tilmælum frá danska Sundhedsstyrelsen**.
- av tí, at føroyska vatnið er **kálkfrítt**, nýta vit ikki evni til at bróta niður kálk við í húsarhaldsvørum okkara, og tað er náttúran fegin um. **Jú færri kemisk evni, vit lata út í umhvørvið, jú betri, halda vit og náttúran.**
- vit hava **egna starvsstovu/laboratorium**, sum í samstarvi við **altjóða serkunnleika** hevur dagliga eftirlitið við menning og framleiðslu.
- vit leggja alstóran dent á at nýta **lætt niðurbrótilig, natúrlig evni úr plantuoljum** í okkara húsarhaldssápum.
- vit eru allergivinarlig. **Eingin** av okkara sápum inniheldur evni, sum standa á listanum hjá ES yvir **allergielvandi evni**, sokallaða allergilistanum.
- **litevnini**, vit nýta, eru tey somu, sum eru **góðkend til nýtslu innan matvøruframleiðslu**.
- Kemilux framleiðir samsvarandi **altjóða ISO 9001:2000 góðskuskipanini**.
- **strongu krøvini**, sum vit seta okkum sjálvum, hava millum annað havt við sær, at Kemilux er **góðkendur veitari** til sera kravmikli **oljuvinnuna.**
- tá tú keypir okkara húsarhaldssápur, keypir tú **grønt og allergivinarligt.**



**KEMILUX**
www.kemilux.fo

*KEMILUX framleiðir samvarandi ISO 9001:2000 skipanini*

# Eykaaðalfundur í P/F Atlantic Petroleum

Boðað verður við hesum til eykaaðalfund í P/F Atlantic Petroleum at verða á Hotel Føroyum, við Oyggjarvegin 45, 100 Tórshavn

**fríggjadagin tann 3. juli 2009 kl. 19.00** (føroyska tíð)

við hesi fundarskrá:

1. **Val av fundarstjóra.**
2. **Val av trimum nýggjum nevndarlimum.**
   Nevndin skjýtur upp at velja trýggjar nýggjar nevndarlimir fyri Kjartan Hoydal, Óla Hammer og Petur Even Djurhuus. Kjartan Hoydal hevur sagt seg úr nevndini og fara Óli Hammer og Petur Even Djurhuus frá á aðalfundinum.
3. **Viðtøkubroytingar.**

   Nevndin skjýtur upp fylgjandi viðtøkubroytingar:

   Í § 16 triðja avsnitt í viðtøkum felagsins verður sett inn orðingin "stjórn við einum ella fleiri stjórum" fyri orðið: "stjóra", men annars er greinin óbroytt og í § 19 fyrsta avsnitt í viðtøkum felagsins verður sett inn orðini: "einum stjóra" fyri orðið: " stjóranum", men annars verður greinin óbroytt.

   Til samtyktar av uppskotunum til viðtøkubroytingar krevst smb. § 78 stk. 1 í partafelagslógini at uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og av tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum.

**Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum.**

Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum fer fram umvegis heimasíðu felagsins www.petroleum.fo ella á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn ella á tlf nr. + 298 350 100 og/ella telefax nr. + 298 350 101. Seinasta freist fyri bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum er mánadagin tann 29. juni 2009 kl. 16.00 (føroyska tíð).

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva øðrum skrivliga fulltrú til at møta tygara vegna. Á heimasíðu felagsins www.petroleum.fo, umframt á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn, kunnu tygum útvega tygum eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi.

Dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum, koma at liggja frammi á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Partapeningur, atkvøðurættur og kontoførandi peningastovnur.**

Partapeningur felagsins er kr. 112.573.000 býttur sundur í partabrøv á kr. 100 og multipla av hesum.

Í § 5 stk. 1 í viðtøkunum er ásett, at partaeigararnir hava 1 atkvøðu fyri hvørjar kr. 100 teir eiga í partapeningi.

Í § 2 stk. 2 er ásett, at eingin partaeigari kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20% av atkvøðunum.

§ 11 í viðtøkum felagsins er soljóðandi:

*"Hvør partaeigari hevur rætt til at møta á aðalfundinum, um viðkomandi í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundinum hevur biðið felagið um atgongumerki.*

*Atkvøðurætt á aðalfundinum hava partaeigarar, sum í seinasta lagi 5 dagar undan aðalfundinum hava biðið felagið um atgongumerki og atkvøðuseðil.*

*Partaeigari kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.*

*Atgongd til aðalfundin hava harumframt fjølmiðlarnir."*

Felagið hevur kosið sær Eik Banki P/F til kontoførandi peningastovn og kunnu parteigarar felagsins venda sær til henda peningastovn á adressuni Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn ella á heimasíðuni www.eik.fo ella á telefon nummar + 298 348 000 fyri at útinna fíggjarligu rættindi síni í felagnum.

**P/F Atlantic Petroleum**
**Nevndin**

Atlantic Petroleum